UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, tann 17. mai 2021
J.nr.: 21/07708-2
At tilskila í svari
Viðgjørt:
Tygara skriv:

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

Svar

uppá

fyrispurning frá Aksel V. Johannesen, løgtingsmanni, eftir Tingskipanini §52a,

Spurningurin var soljóðandi:

1. Fer landsstýrismaðurin at seta í verk eina kanning sum vísir, hvussu tann almenna síðan www.bygdagotur.fo er gjørd, soleiðis at staðfestast kann, um ákærurnar um kopiering, framd av einum almennum stovni, hava hald í veruleikanum ella ikki?

Svar:

Eg skilji væl, at umrøðan, sum nýggja heimasíðan bygdagøtur.fo fekk í Degi og viku 26. mars, kundi geva hyggjarum ta fatan, at talan var um kopiering, framd av einum almennum stovni.

Tað er tó skjótt at staðfesta, at so er ikki. Síðurnar eru gjørdar í hvør sínari heimasíðuskipan og tað eru ikki somu fyritøkur ella fólk, sum hava forritað síðurnar.

Visit Faroe Islands hevur sett fólk at ganga allar túrarnar, skráseta teir á GPS og leggja slóðirnar á netið, so at gongufólk kunnu taka tær niður á fartelefon ella GPS-tóli. Túrarnir eru eisini lýstir stutt í teksti og myndum og við animeraðum korti.

Hjálagt er yvirlit, ið lýsir eina rød av funkum á síðunum báðum. Fleiri funkur eru, sum bara eru á bygdagøtur.fo og nakrar eru bara á hikewithpol.fo. Í øðrum førum eru líknandi upplýsingar vístar á hvør sín hátt.

Tá ið síðurnar fyri ein part lýsa somu túrar, og báðar eru um at ganga í náttúruni, so er ivaleyst sumt sum líkist. Tað er til dømis upplagt at slíkar síður hava myndir frá túrunum, møguleikar at leita og skipa upplýsingar, at sagt verður frá um leiðina, torleikastig, veðurlíkindi o.a.

Tað er eisini vanligt aðrastaðni, at almenn ferðaráð hava hentleikan at leita eftir gongurutum á egnari heimasíðu. Sum dømi kann nevnast heimasíðan hjá Visit Switzerland (myswitzerland.com) og almennu síðuna hjá Den Norske Turistforening (ut.no).

Men bæði endamálið við síðunum, tøknin, myndirnar, teksturin og tøkniligu funkurnar eru ymiskar.

Fyrst og fremst er talan um tvey ymisk endamál. Heimasíðan hikewithpol.fo hevur til endamáls at selja gongutúrar við ferðaleiðara. At íverksetarar gera tænastur til ferðavinnuna er gott, og í samsvari við ferðavinnupolitikk landsins. Pól Sundskarð hevur tí eisini fingið almennan stuðul til at menna heimasíðu við gongutúrum.

Heimasíðan bygdagøtur.fo er ein almenn heimasíða, ið skal liva upp til aðrar treytir. Endamálið við síðuni er at geva ferðandi, føroyingum og útlendingum so góða og óhefta kunning, sum til ber um øll viðurskifti av týdningi, tá ein skal finna sær ein hóskandi túr í føroysku fjøllunum.

Síðan er eitt týðandi amboð í arbeiðinum at skipa føroysku ferðavinnuna og tí er tað av týdningi, at Visit Faroe Islands hevur sjálvstøðugt ræði og ognarskap av hesi síðuni, ið stigvíst verður ment og útbygd, so hon altíð svarar tí tørvi, sum er á greiðari ferðafólkakunning um gongutúrar í Føroyum. Ætlanin við síðuni er t.d. eisini at vísa til aðrar hentleikar og tilboð í ymisku økjunum, so síðan eisini kann brúkast sum eitt amboð at eggja fólki at leggja meiri eftir seg og at spjaða ferðafólk til ymisk stað í landinum.

Heimasíðan hongur neyvt saman við stóra kunningarpallinum whatson.fo, og samlaða miðvísa arbeiðinum at gera fullfíggjaða og einsháttaða skelting og kunning um alt landið. Hetta arbeiðið fevnir eisini um at seta upp kunningarskíggjar og at merkja upp gøtur. Heimasíðan er eitt beinleiðis framhald av hesum. Visit Faroe Islands hevur eisini í mong ár gjørt faldarar við gongutúrum, og at hesir gongutúrar nú eisini eru fluttir á ein talgildan miðil er ein natúrlig menning, ið ger almennu ferðafólkakunningina betri.

Heimasíðurnar, sum ferðavinnuaktørar í Føroyum hava ment, nøkta ikki tørvin á einsháttaðari og fullgóðari kunning um bygdagøturnar og Visit Faroe Islands metti tí, at tað var neyðugt at gera arbeiðið frá grundini. Arbeiðið at menna bygdagøtur.fo varð sett í gongd í 2019 og sagt varð alment frá hesum, tá ið menningarætlanin hjá Visit Faroe Islands varð løgd fram í februar 2019.

Tøkniliga og innihaldsliga eru síðurnar heilt ymiskar, tó at sumt av natúrligum ávum líkist. Tað er tó greitt, at talan er ikki um avrit av hikewithpol.fo ella nakrari aðrari heimasíðu.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, tann 17. mai 2021

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

Niðanfyri er yvirlit frá Visit Faroe Islands, sum heilt stutt lýsir ymsar funkur á síðunum

	bygdagøtur.fo	hikewithpol.fo	
enskt og føroyskt	x	x	tó er ikki allur teksturin týddur
tekstlýsingar	x		heilt fáir túrar
resumé	x		
grid-view	x	x	
map-view	x		
ikon-univers	x		
filtur:	x	x	(heilt hvør sín loysn)
familjuvinaligt	x		
rundferðir	x		
samantvinnaðir túrar	x		
favorite (hjarta)	x		
torleikastig	x	x	(øðrvísi skala og ikki sama meting)
nærri lýsing av torleikastigi	x		
rating eftir liti	x		
longd	x	x	(øðrvísi skala og ikki sama meting)
tíð	x		
besta ætt		x	
veðrið nú	x	x	(hvør sín loysn)
veðurforsøgn	x		
web-cam		x	(á summum rutum)
3D-view	x		
gpx-fílur (báðar vegir)	x		
lýsing av lendi	x		
lýsing um barnavinaligheit	x		
nærri lýsing av torleikastigi	x		
hægsta stað	x		
hæddarmetrar	x		
hæddarkurva	x		
líknandi gongutúrar (øki/torleikastig)	x		vísir til aðrar túrar í sama øki
instagram-modul	x		
kort	x	x	(heilt hvør sín loysn)
leiðbeining - at koma til staðið, har gøtan byrjar	x		
parkeringslýsing (báðar bygdir)	x		
myndir av parkeringsumstøðum	x		
leiðbeining frá bygd til bygdagøtu	x		
street-view	x		
integratión við aðra ferðafólkakunning	x		
integratión við skelting	x		
integratión við leiðbeining á staðnum	x		